

# Álit um ferðsluhagtøl

Við hesum vil arbeiðsbólkurin, sum Vinnumálaráðið setti at arbeiða við ferðsluhagtølum, leggja fram álit sítt.

*Arbeiðssetningur:*
Arbeiðsbólkurin skal finna fram til, hvørji ferðsluhagtøl, ið okkum tørvar í Føroyum sum fyritreyt fyri best møguligum ferðsluvanlukkufyribyrgjandi arbeiði. Harumframt skal arbeiðsbólkurin koma til eina niðurstøðu um, hvussu hesi hagtøl fáast til vega á skilabesta hátt, umframt at fáa greiðu á, hvussu tølini skulu handfarast, so at arbeiðið verður í tráð við galdandi ásetingar hjá eitt nú skrásetingarráðnum.

*Tilmæli:*
Arbeiðsbólkurin mælir til, at sett verður á stovn ein felags skráseting av øllum viðurskiftum í sambandi við ferðslu og serstakliga ferðsluóhapp og -vanlukkur í Føroyum.

Skipanin skal vera teldutøk á alnótini; partar av henni skulu vera til almenningin at nýta, meðan aðrir partar eru bert til avvarðandi myndugleikar og aðrar skrásettar brúkarar.

Landsverk hevur ábyrgdina av telduskipanini og dátunum í henni. Politiið hevur høvuðsábyrgd av at skráseta ferðsluóhappini og sjúkrahúsverkið ábyrgd av skrásetingini av ferðsluskaðunum.

Við at hava felags skráseting, har so nógv sum gjørligt viðvíkjandi ferðsluóhappum er skrásett av teimum, sum varða av dátunum, og er tilgongt hjá hinum, fæst besta dátugrundarlagið, tá arbeiðast skal við ferðsluvanlukkufyribyrging.

Málið er, at øll ferðsluóhapp, stór og smá, verða skrásett á einum stað. Her hava vit ein einastandandi møguleika við tað, at vit eru eitt lítið land, har ikki er ógjørligt at fáa eina fullfíggjaða skráseting.

Fyri altíð at hava dagførda og viðkomandi skráseting av hagtølum verður mælt til, at ein fylgibólkur verður settur at fylgja við í arbeiðinum. Bólkurin savnast eina til tvær ferðir um árið at eftirmeta skrásetingina og viðgera dagføringar og menning av skrásetingini.

Tórshavn 5. des 2008:

Høgni Debes Joensen, Landslækni

Armgarð Steinhólm, Landsverk

Høgni Djurhuus, Landsjúkrahúsið

Sølvi Reinert Hansen, Ráðið fyri Ferðslutrygd

Kári Thorsteinsson, Politiið

Rannvá í Króki, Landsverk




## 1. Inngangur

Á várið 2006 setti Vinnumálaráðið ein arbeiðsbólk at arbeiða við ferðsluhagtølum. Endamálið var at orða eitt álit um ferðsluhagtøl, og arbeiðssetningurin hjá bólkinum var:

*Arbeiðsbólkurin skal finna fram til, hvørji ferðsluhagtøl okkum tørvar í Føroyum sum fyritreyt fyri best møguligum ferðsluvanlukkufyribyrgjandi arbeiði. Harumframt skal arbeiðsbólkurin koma til eina niðurstøðu um, hvussu hesi hagtøl fáast til vega á skilabesta hátt, umframt at fáa greiðu á, hvussu tølini skulu handfarast, so at arbeiðið verður í tráð við galdandi ásetingar hjá eitt nú skrásetingarráðnum.*

### 1.1. Skipan av arbeiðinum

Arbeiðsgongdin var hendan:

1) arbeiðsbólkurin varð settur
2) líknandi hagtøl úr øðrum londum verða kannað
3) allir limir í bólkinum gera yvirlit yvir, hvørji hagtøl tey hava tørv á
4) listin verður samskipaður
5) hvussu fáa vit fatur á hesum dátunum
6) fáa til vega heimildir, Dátueftirlitið o.t.
7) gera eina ætlan fyri, hvussu dáturnar kunnu fáast til vega, hvussu tær skulu skrásetast, og hvussu tær kunnu nýtast
8) orða álitið

Álitið skuldi fyriliggja á sumri 2008, men av ymiskum orsøkum er tíðarfreistin flutt til 5. desember 2008.

Í arbeiðsbólkinum eru:

Høgni Debes Joensen, landslækni, formaður
Armgarð Steinhólm, Landsverk
Høgni Djurhuus, Landsjúkrahúsið
Sølvi Reinert Hansen, Ráðið fyri Ferðslutrygd
Kári Thorsteinsson, Politiið
Rannvá í Króki, Landsverk, skrivari

Fleiri av limunum í bólkinum eru farin úr arbeiðinum og onnur komin ístaðin. Í arbeiðsbólkinum hava eisini verið: Jón Kragesteen, Ráðið fyri Ferðslutrygd, Jákup N. Olsen, Landsverk, Johan Petur Johansen, Politiið og Jóna Rasmussen, Politiið.



## 2. Endamálið við at savna og viðgera ferðsluhagtøl

Hvørt einasta ár verða fleiri fólk álvarsliga skadd ella doyggja í ferðsluni, og umframt tær reint menniskjansligu avleiðingarnar, er hetta er ein stórur fólkaheilsutrupulleiki og ein missur fyri samfelagið sum heild. Sambært nullhugsjónini kann tað ikki góðtakast, at fólk doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni.

Í Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar frá sept. 2007, var eitt av teimum 35 tilmælunum at fáa til vega og betra dygdina á hagtølum um ferðslu. Í føroyskum ferðslutrygdararbeiði hevur leingi verið ein trupulleiki, at ikki nóg góð og neyv hagtøl hava verið at arbeiða við.

Aðrastaðni er skrásetingin av ferðsluóhappum og –vanlukkum grundarsteinurin undir øllum ferðslutrygdararbeiði, og arbeitt verður har alsamt fram ímóti at fáa eina so neyva og fullkomna skráseting sum gjørligt.

Tá nullhugsjónin var samtykt í Løgtinginum í 2006, var tað ein staðfesting av, at heldur ikki í Føroyum kunnu vit sum samfelag góðtaka, at fólk doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni.

Fyri at kunna seta inn meira miðvíst móti ferðsluóhappum, er umráðandi at vita, hvat hendi, hví tað hendi, og hvat kann gerast fyri at fyribyrgja, at tað hendir aftur. Hagtøl um ferðsluvanlukkur eru syndarlig at skráseta og lesa, men tey geva neyðuga grundarlagið at betra støðuna munandi.

Vitanin um, hví og hvar ferðsluóhapp og - vanlukkur henda, kann í seinasta enda spara mannalív.

Hagtøl um ferðslu og ferðsluóhapp eru avgerandi fyri at gera vælvirkandi ferðslutrygdarstrategiir. Hvør er trupulleikin ella trupulleikarnir heilt neyvt? Hvør er orsøkin til, at óhappini henda? Jú fleiri upplýsningar vit hava um ferðsluna og gongdina í ferðsluóhappum, tess betri kunnu vit seta inn á røttum støðum og finna hóskandi loysnir á trupulleikunum. Neyðugt er við neyvari og umfatandi skráseting fyri at kunna viðgera ferðslutrygdina og mæla til loysnir. Eisini fyri at kunna raðfesta tiltøkini, er neyðugt við viðgerð av trupulleika og avleiðingum.

Við eini felags skrásetingarskipan, har øll ferðsluóhapp verða skrásett saman við upplýsingum um t.d. slag av persónskaða, kann eitt nógv betri fyribyrgjandi arbeiði gerast. Samband kunnu finnast millum dátur, sum annars ikki høvdu verið funnin.



## 3. Lýsing av verandi støðu

3.1. Ferðsluhagtøl í øðrum londum – loysnir og møguleikar

Allastaðni verða ferðsluóhapp skrásett, men ymiskt er, hvussu umfatandi skrásetingarnar eru.

Generelt verður roknað við, at ferðsluvanlukkur, ið hava við sær deyða, verða skrásettar neyvt nærum allastaðni; eini 85% til 95% av hesum verða skrásettar. Síðani fellur talið av skrásettum óhappum í mun til veruliga talið av óhappum alt eftir, hvussu umfatandi óhappið er. Umleið 60% av óhappunum við álvarsligum fólkaskaða verða skrásett, og umleið 30 % við minni fólkaskaða. Einaóhapp og óhapp, har bilar ikki eru við í óhappinum, verða ikki skrásett eins væl, og hetta hevur við sær, at samlaða myndin av óhappstøðuni er skeiv, tí hetta slagið av óhappum ikki er við í hagtalsyvirlitum og tí verður undirmett; hædd verður ikki tikið fyri hesum, tá ferðslutrygdartiltøk skulu gerast.

Miðað verður tí ímóti at gera skrásetingina av óhappum so fulkomna og umfatandi sum gjørligt, so hon sýnir veruleikan so væl, sum til ber.

Noreg
Í Noregi verða ferðsluóhapp við fólkaskaða skrásett á Statistisk Sentralbyrå.

Eisini skrásetur vegaverkið ferðsluóhapp út frá politifrágreiðingum, eins og her hjá okkum. Har er staðfest, at nógv óhapp við fólkaskaða verða ikki skrásett hjá politinum og harvið hjá vegaverkinum. Hóast sjúkrahúsini hvørt ár viðgera eini 40.000 ferðsluskaðar, verður minni enn helmingurin av hesum skrásettur í politifrágreiðingunum. Harumframt verður ikki skrásett nóg greitt, hvønn skaða, talan er um. Serliga eru tað einaóhapp og óhapp á súkklu, sum ikki verða skrásett.

Í Noregi eru tey tí farin undir eina verkætlan, eitt samstarv millum ymisku stovnarnar, ið varða av ferðslutrygdini, fyri at fáa eina so fullfíggjaða skráseting, sum til ber. Millum annað skulu skaðastovurnar skráseta allar ferðsluskaðar, ið tey viðgera, so øll ferðsluóhapp verða skrásett; eisini tey, har eingin politifrágreiðing verður skrivað.

Norska Vegaverkið samskipar arbeiðið at fáa eina so fullkomna skráseting sum gjørligt av ferðsluóhappunum í Noregi.

Danmark
Í Danmark skrásetur politiið ferðsluóhapp. Har nýta tey skipanina POLSAS, sum er koyrd saman við eini skrásetingarskipan hjá Vejdirektoratet. Í skipanini vejman.dk verða øll óhappini, har ið politifrágreiðing er skrivað, savnaði.

Ein verkætlan hevur í fleiri ár verði roynd í Odense, har skrásetingin frá politinum er sett saman við skrásetingini av ferðsluskaðum á skaðastovum og sjúkrahúsum. Royndirnar av hesi verkætlan eru góðar.

Í Danmark arbeiða tey í løtuni við at koyra sjúkrahúsdata og skrásetingina hjá Vejdirektoratet (politifrágreiðingarnar) saman til eina felags skráseting. Fyrimyndin er millum annað royndirnar úr Odense. Úrslitini av hesi samankoyring verða tøk seinni í ár, men væntandi fer hendan samskipan av dátum at geva eina betri mynd av støðuni.

Ísland

Í Íslandi nýta tey telduskipanina VIS (nú vejman.dk), sum danska Vejdirektoratet hevur gjørt. Skrásetingin byggir á politifrágreiðingar, og ein trupulleiki í Íslandi er, at heldur ikki har verða øll óhapp skrásett.

Svøríki

Í Svøríki byggja óhappshagtølini hjá Vegaverkinum á politifrágreiðingar. Politiið skrásetur óhappini í skipanini hjá Vegaverkinum, STRADA. Hesar upplýsingar eru grundarlagið undir arbeiðinum hjá Vegaverkinum og øllum hagtalsarbeiðinum viðvíkjandi ferðsluóhappum.

Í Svøríki verða heldur ikki øll óhapp skrásett. Rákið er hitt sama, at mestsum øll óhapp, har onkur doyr, verða skrásett, men síðani færri og færri, alt eftir hvussu álvarsamur fólkaskaðin er. Skrásetingin av ávísum sløgum av óhappum er ov óneyv; t.d. eru lutfalsliga fá av óhappunum við súkklistum skrásett. Skrásetingin er eisini ymisk millum landslutirnar.

Sjúkraverkið hevur heilt onnur tøl viðvíkjandi skaddum í ferðsluóhappum. Umleið tríggjar ferðir so nógv ferðsluskadd eru sambært skrásetingunum hjá sjúkrahúsunum samanborið við skrásetingina hjá politinum. Í Svøríki arbeiða tey við at samskipa hesar skrásetingarnar.

3.2 Skrásetingin í Føroyum

Landsverk hevur eitt dátusavn við øllum ferðsluóhappum síðani 1986, sum politiið hevur gjørt politifrágreiðing fyri. Dátusavnið er hjá Landsverki, men onnur kunnu fáa upplýsingar úr tí eftir tørvi, m.a. fær Hagstovan hagtøl árliga.

Í sambandi við ferðsluóhappshagtøl er skrásetingin eitt samstarv millum politiið og Landsverk. Politiið skrivar politifrágreiðing um øll óhapp, og Landsverk skrásetur óhappini í dátusavnið. Ynskiligt hevði verið at fingið hetta gjørt meira digitalt, so somu data ikki skulu tastast inn tvær ferðir – eitt hugskot er at gera sum í Danmark, har øll óhapp verða skrásett í POLSAS skipanini hjá politinum og flutt til Vejdirektoratet aðruhvørja viku.

Onnur skráseting av týdningi fyri óhappsskráseting er skrásetingin av fólki við ferðsluskaða, sum skaðastovur/sjúkrahús gera, ferðsluóhappsskráseting hjá tryggingarfeløgunum og akfarsskráseting hjá Akstovuni.

Skrásetingin av ferðsluóhappum í Føroyum er ikki samskipað, og hóast hvør í sínum lagi skrásetir tað, tey kunnu, høvdu allir partar haft stóra nyttu burturúr eini samskipan. Sum dømi um ymiskleika í skrásetingini kann nevnast, at tryggingarfeløgini skráseta eini tríggjar ferðir fleiri ferðsluóhapp orsakað av seyði, enn politifrágreiðingarnar vísa.

Verandi skráseting er ófullfíggjað, øll óhapp verða ikki skrásett og umráðandi dátur eru ikki nógv væl skrásettar, til dømis staðfesting av júst hvar óhappið hendi og lýsingin av hvat hendi. Dáturnar eru ikki lættar arbeiða við og at fáa fatur á.



## 4. Uppskot til loysn

4.1. Neyðug hagtøl
Allir limir í Hagtalsbólkinum hava gjørt eitt yvirlit yvir, hvørji hagtøl tey hava tørv á. Listin er síðani samskipaður og liggur hjálagdur sum fylgiskjal 1.

Upplýsingarnar fevna um óhappið, fráboðanina um óhappið, umstøðurnar, akfarið/akførini, fólkini í óhappinum, og hvønn skaða tey fingu. Eisini verður komið inn á, hvør hevur ábyrgdina av óhappinum eins og tryggingarspurningar.

4.2. Ábyrgd
Staðfest var tíðliga í arbeiðinum, at Landsverk hevur ábyrgdina av ferðsluhagtølum, her uppi í ferðsluóhappshagtølum.

Í sambandi við eina felags skráseting av dátum eru ymiskir stovnar, ið varða av dátunum. Akstovan hevur ábyrgdina av upplýsingum um akfør, politiið um óhapp og umstøður, Landsverk um vegaumhvørvið og sjúkrahúsverkið um fólkaskaða og avleiðingarnar.

Mannagongd má gerast fyri skráseting av upplýsingunum. Í høvuðsheitum eigur tann, ið hevur ábyrgdina av dátunum, at skráseta tær, men tað velst um, hvør telduskipan og hvørjar mannagongdir verða valdar.

Umleið helvtin av vegakervinum eru kommunalir vegir. Samstarv eigur tí at gerast við kommunurnar, sum eisini kunnu fáa atgongd til óhappsskrásetingina.

4.3. Skrásetingarheimild
Dátueftirlitið skal í slíkum førum hava eina fráboðan í seinasta lagi 30 dagar, áðrenn farið verður undir at skráseta dáturnar.

4.4. Felags skrásetingarskipan
Ein loysn er at gera eina serføroyska skrásetingarskipan til ferðsluóhappsupplýsningar; ein annar møguleiki er at kanna, hvørjar skipanir verða nýttar aðrastaðni.

Í fylgiskjali 2 er eitt yvirlit yvir, hvørjar upplýsingar skulu skrásetast fyri at kunna fáa hagtølini, ið nevnd eru omanfyri.

Fyrst er hugt eftir, um ein verandi telduskipan kann nøkta okkara tørv á skráseting av ferðsluóhappum. Ein fyrimunur við at velja eina standardskipan er, at okkum ikki nýtist at byrja av nýggjum. Vit kunnu læra av tí, ið onnur longu hava gjørt og sleppa undan at gera somu feilir. Ein annar fyrimunur er, at vit fáa atgongd til somu dagføringar av skipanini, sum tey. Við at hava eina standardskipan eru vit ikki so tengd at ávísum persónum. Vansin við at velja eina standardskipan er, at vit ikki fáa alt, vit ynskja okkum, skrásett á júst tann háttin vit ætlaðu, ella at vit fáa eina stóra skipan, har vit bert nýta ein part av upplýsingunum.

Ein standarskipan er kannað nærri. Telduskipanin vejman.dk verður nýtt bæði í Danmark og í Íslandi. Listin í fylgiskjali 2 er sammettur við tað, sum verður skrásett í vejman.dk, og ávísar tillagingar kunnu gerast av vejman.dk, fyri at skipanin kann nøkta okkara skrásetingartørv. Ætlanin er, at byrjað verður við at skráseta ferðsluóhapp út frá politifrágreiðingunum, og síðani útbyggja skipanina stig fyri stig við sjúkrahúsdátum, tryggingardátum o.ø.

Ætlanin er, at skipanin skal liggja hjá Vejdirektoratet í Danmark, tí tey hava frammanundan donsku skipanina um hendi, og við at leggja føroyska dátusavnið hjá teimum, minkar umsitingarkostnaðurin hjá okkum. Vit fáa eisini aðrar fyrimunir, t.d. dagføringar av skipanini. Liggur sjálv skipanin í Danmark, er kostnaðurin á stovningini av telduskipanini lutfalsliga lítil; einki forrit skal leggjast á teldurnar hjá okkum, ið skulu nýta skipanina. Eisini spara vit nakað av tíð við hesi loysnini.

Øll atgongd til skipanina verður um alnótina. Vit fáa atgongd við innritanarnavni og loyniorði, og alt eftir hvat slag av brúkara, talan er um, fær viðkomandi rættindi til at leggja upplýsingar inn ella bert at hyggja at ávísum upplýsingum.

Ein fyribils meting av kostnaðinum fyri slíka skipan er um 500.000 kr. til at seta á stovn skipanina og um 150.000 kr. árliga til rakstur. Vit leggja sjálvi dáturnar inn í skipanina, og hetta er mett at taka einar 18 vikur. Tillagingar til standardskipanina kosta eyka – einar 50.000 kr. fyri hvørt slag av eyka upplýsingum, ið okkum tørvar.

Landsverk skrásetur dáturnar í skipanina, allarhelst við eini elektroniskari skipan, har dáturnar verða fluttar úr skipanini hjá politinum. Arbeitt eigur at verða framm ímóti, at politiið skrásetur beinleiðis í skipanina.

Fyri at fáa lýstu skrásetingarskipan at virka sum best verður mælt til at:

- politiið fer at skráseta ferðsluóhapp í POLSAS ella líknandi skipan, ið kann samskipast við vejman.dk
- at Landsverk fer at nýta vejman.dk til óhappsskráseting
- at skrásetingin millum politiið og Landsverk verður so samskipað, sum til ber
- at skipanin verður útbygd til at umfata sjúkrahúsdátur, tá hetta er vorðið ein partur av skipanini í Danmark
- at skipanin seinni verður útbygd til at umfata aðrar skrásetingar, t.d. frá tryggingarfeløgunum
- at hagtølini verða so fullkomin, sum til ber, og at tey eru løtt at fáa fatur á hjá teimum, ið hava tørv á teimum

Landsverk stendur fyri arbeiðinum at seta á stovn skrásetingarskipanina vejman.dk. Mælt verður til, at ein arbeiðsbólkur umboðandi Landsverk og politiið verður settur at gera mannagongdir fyri skráseting av politifrágreiðingum í vejman.dk.

## 5. Skjøl

Fylgiskjal 1: Samskipaður listi yvir hvørjar upplýsingar Ferðsluhagtalsbólkurin ynskir.

<u>Listin yvir hagtøl, sum vit skulu hava fatur á:</u>

| | |
|---|---|
| Tal á ferðsluvanlukkutilburðum við deyða í mun til allar deyðatilburðir eftir aldursbólkum og ára skeiðum | Landslæknin + Hagstovan |
| Vanlukkur pr. 100.000 | Sjúkrahúsverkið |
| Ferðsluvanlukkur pr. 100.000 pr. ár | Sjúkrahúsverkið |
| Vanlukkur og ferðsluvanlukkur pr. 100.000 | Sjúkrahúsverkið |
| Tal á vanlukkum v/fólkaskaða pr. ár (allar vanlukkur, ikki bara ferðsluvanlukkur) | Skaðastovan |
| Tal á ferðsluvanlukkum v/skaða pr. ár | Skaðastovan |
| Mist liviár fyri hvønn ferðsludeyðan | Politiið |

| | |
|---|---|
| Heilsustøða áðrenn óhappið (t.d. verður heilivágur tikin) | Heilsuverkið + kommunulækni |
| Sjúkramelding hjá ferðsluskadda eftir skaða | Heilsuverkið + kommunulækni |
| Avlamisstig / avlamisslag | Landslæknin |
| Deyðsorsøk og viðvirkandi deyðsorsøk | Landslæknin |
| Deyðsháttur | Landslæknin |
| Hædd og vekt (BMI) deyð og skadd - evt. meting | Politiið + Heilsuverkið |
| Talið á passagerum og aldur teirra | Politiið |
| Tal á fólkum, sum eru innblandaði í ferðsluvanlukkuna | Politiið |
| Nýtti bilførari/passagerur rætta trygdarútgerð (trygdarbelti, rætt fastspent pinku-/smábørn, hjá verndarklæðir) | Politiið |
| Var førarin ávirkaður av rúsdrekka, øðrum rúsevnum, manglaði svøvn e.l. | Politiið |
| Helt førarin ferðmarkið + hvussu høg var ferðin | Politiið |
| Bilførarin á veg frá x til y | Politiið |
| Tann skaddi á veg frá x til y | Politiið |
| Førarin staðkendur ella ikki, evt. turistur | Politiið |
| Aldur + kyn á førara/passagerum | Politiið |
| Grov ábyrgdarleys koyring (nakað man kann verða ákærdur fyri samb. revsilógini - o.a.) | Politiið |
| | |
| Hvør trygdarútgerð er í akfarinum, t.d. airbags | Politiið |
| Hvussu var bilurin skøddur, slag av dekkum, og vóru dekkini slitin ella ikki | Politiið |
| Slag av akfari (persónbilur, lastbilur, bussur osv.) | Politiið |
| Tal á akførum, sum eru innblandaði í vanlukkuna | Politiið |
| Brek í akfari (materiali) | Politiið |
| Bilmerki - aldur - prísur - litur | Politiið |
| | |
| Tíð frá tí at sjúkrabilur er varskógvaður, til hann er á vanlukkustaðnum + tíð frá vanlukkustað sjúkrahús | Sjúkrahúsverkið |
| Staðfesting av vanlukkum við GSP | Landsverk |
| Er orsøkin til vanlukkuna a) í bilinum, b) uttan fyri bilin, c) bæði | Politiið |
| Endamálið at koyra var arbeiðsørindi | Politiið |
| Endamálið at koyra var til og frá arbeiði | Politiið |
| Endamálið at koyra var marglæti ella stytta sær stundir | Politiið |

| | |
|---|---|
| Endamálið at koyra var innkeyp/húsarhald | Politiið |
| Endamálið at koyra var at flyta børn til ella frá skúla | Politiið |
| Endamálið at koyra var at flyta børn til ella frá frítíðarítrivi | Politiið |
| Í hvørjari kommunu hendi óhappið | Politiið |
| Hendi vanlukkan í sama bústaðarøkið, har tann skaddi býr | Politiið |
| Hendi vanlukkan í bygdum ella óbygdum øki | Politiið |
| Býur / bygd (býur > 1500) | Politiið |
| Landsvegur / kommunalur vegur / privatur vegur | Politiið |
| Skúlavegur ella ikki | Politiið |
| Staðið, har vanlukkan hendi | Politiið |
| Hendi vanlukkan í øki við serligum ferð-/løgreglueftirlitið | Politiið |
| Ferðmark (km/t) | Politiið |
| Slag av vegi: breiður/smalur - beint strekki/sving - vegamót - tunnil | Politiið + Landsverk |
| Er bilverja á vegastrekkinum | Politiið + Landsverk |
| Vegamerking í lagi (skeltir - vegstrípur) | Politiið + Landsverk |
| Árstíð | Politiið |
| Hvønn dag í viku hendi vanlukkan - gerandis-/sunnu-/heilidag | Politiið |
| Hvat klokkan hendi vanlukkan | Politiið |
| Nær varð vanlukkan meldað | Politiið |
| Myrkt - dagsljós - minkandi/vaksandi dagslýsi | Politiið |
| Vegastrekki við ella uttan ljós (tendraði / ikki tendraði / finnast ikki) | Politiið |
| Sýnið gott / minni gott | Politiið |
| Veðrið: einki avfall - regn - toka - kavi/vátakavi/heglingur - nógvur vindur | Politiið |
| Føri: turrur vegur - vátur vegur - hálur vegur | Politiið |
| Randbebyggelse - samb. politirapport (1-6) | Politiið |
| Vejudformning - samb. politirapport (1-12) | Politiið |
| Tal á politistum í ferðsluarbeiði (ein bólkur á 6 politistar - altíð 2 ella fleiri hvønn dag) | Politiið |
| | |
| Bústaðarkommuna | Politiið + Landsfólkayvirlitið |
| Eigur bilførarin sjálvur bilin (ja/nei) | Politiið + Akstovan |
| Bilførarin koyrikort í hvussu nógv ár og mánaðir | Hagstovan + Politiið |
| Hvussu nógvar km pr. ár í meðal hevur førarin koyrt | Akstovan |
| Slag av akfarstrygging | Politiið |
| Útgoldið í trygging ísv. materiellan skaða á akfar | Trygging |
| Sosialur bólkur | |
| Inntøkubólkur hjá bilførara | Politiið + Toll og Skatt |
| Útbúgvingarstøði | Politiið |
| Slag av starvi | Politiið |
| Sivil støða (giftur, ógiftur osv.) | Politiið |
| | |
| Prosenttalið eftir aldursbýti fyri tey, ið hava koyrikort | Akstovan |
| Tal á nýseldum motorsúkklum í mun til mánaðir og ár | Akstovan |

Fylgiskjal 2: Upplýsingar at skráseta fyri hvørt óhapp

| *Slag av upplýsing* | *Kelda* | *vejman.dk* |
|---|---|---|
| **Óhappið** | | |
| - tíðarfesting, nær hendi óhappið | Politifrágreiðing | X |
| - tíðarfesting, nær varð óhappið fráboðað | Politifrágreiðing | |
| - hvør fráboðar | Politifrágreiðing | |
| - orsøk (tekstur) | Politifrágreiðing | |
| - er orsøkin til óhappið a) í akfarinum b) uttanfyri c) bæði | Politifrágreiðing | Lutvíst |
| - tal av akførum/fótgangarum í óhappinum | Politifrágreiðing | X |
| - slag av óhappi (jvf VIS vejledning og pol.rapport) (nýtt) | Politifrágreiðing | |
| - hvønn veg koyrdu akførini (nýtt) | Politifrágreiðing | X |
| **Sjúkrabilur** | | |
| - nær fær sjúkrabilur boð um at koma a staðið | Sjúkrahúsverkið | |
| - nær er sjúkrabilur á staðnum | Sjúkrahúsverkið | |
| - nær er sjúkrabilur á sjúkrahúsinum | Sjúkrahúsverkið | |
| **Umstøðurnar** | | |
| - veður | Politifrágreiðing | |
| - ljós (myrkt, dagslýsið, skýming, lýsing) | Politifrágreiðing | X |
| - sýni | Politifrágreiðing | X |
| - føri (turrur/vátur/hálur vegur) | Politifrágreiðing | X |
| - vegljós (tendraði/ikki tendrað/finnast ikki) | Politifrágreiðing | X |
| - vegamerking | Politifrágreiðing | X |
| - skelting | Politifrágreiðing | |
| - vegastokkur/bilverja | Politifrágreiðing | |
| - serlig tiltøk (ferðgáar/ATK) | Politifrágreiðing | X |
| - tal av politistum í ferðsluarbeiði ? | Politifrágreiðing | |
| - mest loyvda ferð á staðnum | Politifrágreiðing | X |
| - er vejarbeiði í gongd á staðnum | Politifrágreiðing | X |
| - víkiskylda (nýtt) | Politifrágreiðing | X |
| **Staðfesting (hvar?)** | | |
| - staðfesting GPS koordinatar | Politi/Landsverk | X |
| - bygt øki (j/n) | Politifrágreiðing | X |
| - skúlavegur (j/n) | Politifrágreiðing | X |
| - slag av bygdum øki (t.d. villakvarter) | Politifrágreiðing | X |
| - slag av vegi/vegabygnaður, t.d. breidd, sneiðing, vegamót, tunnil | Politifrágreiðing | X |
| - bygd/býur (navn) | Politifrágreiðing | X |
| - kommuna | Politifrágreiðing | X |
| - landsvegur / komm. vegur / privatur vegur / annað | Politifrágreiðing | X |
| **Akfarið** | | |
| - slag (persónbilur, bussur, lastbilur etc.) | Politifrágreiðing | |
| - mett ferð | Politifrágreiðing | |
| - brek í akfari áðrenn óhappið (t.d. defekt ljós) | Politifrágreiðing | |
| - dekk (slag/slit) | Politifrágreiðing | |
| - nummarpláta (skrásetingarnummar / skrokknummar) | Politi/Akstovan | |
| - bilmerki (+aldur, prísur, litur) (skrásetingarupplýs.?) | Politi/Akstovan | |
| - trygdarútgerð í akfari, t.d. airbags | Politi/Akstovan | X |
| - slag av trygging | Politi/Akstovan | X |
| - útgoldið í trygging (hetta óhappið) | Tryggingarfeløg | X |
| - skaði á akfarið í óhappinum | Tryggingarfeløg | |
| **Persónar** | | |
| Fyri allar persónar í óhappinum verður skrásett | | |
| - aldur | Politifrágreiðing | X |
| - kyn | Politifrágreiðing | X |
| - bústaðarkommuna | Politifrágreiðing | |
| - fótgangari/súkklistur/ferðafólk/førari | Politifrágreiðing | X |
| - plasering í akfari (framman/aftan, vinstru/høgru síðu) | Politifrágreiðing | Lutvíst |

| | | |
|---|---|---|
| - varð trygdarútgerð nýtt (t.d. trygdarbeltið) | Politifrágreiðing | Lutvíst |
| Fyri bilføraran verður harumframt skrásett | | |
| - eigur førarin sjálvur akfarið | Politi/Akstovan | |
| - hevur førarin koyrikort til hetta slag av akfari | Politi/Akstovan | X |
| - nær fekk førarin koyrikort fyrstu ferð (frá POLSAS?) | Politi/Akstovan | X |
| - ávirkaður av rúsdrekka/rúsevnum/heilivági | Politifrágreiðing | X |
| - manglar svøvn | Politifrágreiðing | |
| - staðkendur (ella t.d. turistur) | Politifrágreiðing | |
| - koyrir xx km um árið | Politifrágreiðing | |
| - inntøkubólkur | | |
| - sosialur bólkur | | |
| - útbúgvingarstøði | | |
| - starv | Politifrágreiðing | |
| - sivil støða (giftur/ógiftur) | | |
| Heilsustøða (allir persónar í óhappinum) | | |
| - heilsustøða áðrenn óhappið | Sjúkrahúsverkið? | |
| - sjúkrameldan eftir óhappið | Sjúkraverkið? | |
| - avlamisstig/avlamisslag eftir óhappið | Sjúkraverkið? | |
| - trygging? | | |
| **Skaði** | | |
| - deyður | Politifrágreiðing | X |
| - deyðsorsøk/viðvirkandi deyðsorsøk | Politifrágreiðing | |
| - deyðsháttur | Sjúkraverkið | |
| - slag av skaða (nýtt) | Sjúkraverkið | X |
| - skaði (nýtt) | Sjúkraverkið | X |
| - viðgjørdur á hvørjum sjúkrahúsi | Sjúkraverkið | X |
| - innlagdur/observatión/skaðastova | Sjúkraverkið | X |
| - hædd | Sjúkraverkið | |
| - vekt | Sjúkraverkið | |
| | | |
| **Ábyrgd** | | |
| - verður ákæra reist í sakini, t.d. grov ábyrgdarleys koyring | Ákærumyndugleiki | |
| | | |
| **Endamálið við ferðini** | | |
| - var á veg frá X til Y | Politifrágreiðing | |
| - endmálið arbeiðsørindi, til/frá arbeiði, marglæti, innkeyp, børn til/frá skúla, frítíðarítriv | Politifrágreiðing | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |